Tórshavn 30. januar 2018

Kom og les!

Til heimið!

Frá 5. - 27. februar verður lesiátakið " Kom og les". Átakið er fyri allar næmingar.

Endamálið er, at øll børnini lesa í 40 min. um dagin, t.e. 20 min. í skúlanum og 20. min. heima.

Næmingarnir í hvørjum flokki byrja við somu bók. So hvørt næmingurin er liðugur við eina bók, ummælir hann bókina. Eftir at felagsbókin er liðug, eru næmingarnir vælkomnir at læna bøkur á bókasavninum ella hava bøkur við heimanífrá. Næmingarnir skulu lesa føroyskar bøkur.

Heitt verður á tykkum um at taka væl undir við tiltakinum og at tit sita saman við barninum í 20 min. um dagin og lesa.

Tað er umráðandi, at børnini altíð hava bøkurnar til " Kom og les" við í skúla. Tí fara vit at heita á tykkum at ansa eftir, at bókin til lesiløtuna er í taskuni, tá barnið fer í skúla.

Í skúlanum verður tiltakið skipað soleiðis, at hvønn morgun verður ringt til lesiløtu, og øll seta seg at lesa.

Vinarliga

Skúlastjórin